# Rætturin til at kúga øðrvísi hugsandi

**Ískoyti til kjakið um broyting í anti-diskriminatiónsparagraffini**

**Heini í Skorini**
*lesandi*

"Demokrati er respekt for den andens anderledeshed". Soleiðis sigur danski demokratiteoretikarin Hal Koch í bókini "Hvad er demokrati" frá 1945.

Men hendan meginreglan tykist ikki vera galdandi í løggevandi forsamlingini í Føroyum. Uppskotið hjá tinglimunum Annitu á Fríðriksmørk og Finni Helmsdal um, at tey samkyndu eisini skulu vera umfataði av anti-diskriminatiónsparagraffini í revsilógini, var til fyrstu viðgerð í tinginum fríggjadagin, og tað tyktist vera greitt, at meirilutin av okkara fólkavaldu ikki ynskir minnilutaverju fyri tey samkyndu.

Høvuðsgrundgevingin er, at ein slík broyting er ein hóttan móti trúarfrælsinum og skrivi- og talufrælsinum, sum jú er lívsnervin í einum og hvørjum fólkaræði. Víst verður á, at broytingaruppskotið hjá Finni og Annitu í veruleikanum kriminaliserar tað, Bíblian sigur um samkynd, og at økt rættindi til samkynd samstundis skerjir rættindini hjá teimum, sum taka frástøðu frá samkyndum livihátti.

### Trúarfrælsið skal varðveitast

Men hesin argumentatiónshátturin er antin ein misskiljing ella ein tilvitað politisk strategi. Endamálið við uppskotinum er ikki, at føroyingar ikki skulu hava loyvið til at hava sínar egnu sannføringar. Har stendur einki um, at trúgvandi føroyingar ikki skulu sleppa alment at taka frástøðu frá samkyndum livihátti. Har stendur einki um, at bíbilsku boðskapirnir skulu kriminaliserast. Og har stendur einki um, at trúarfrælsið skal skerjast.

Harvið er ikki sagt, at teir vandar, sum kristni vongurin hevur kastað ljós á, skulu ignorerast. Víst kann ov nógv regulering skapa eina "korrektheit", sum kann drepa almenna kjakið og eliminera meiningar og konfliktir, sum veruliga eksistera, har ein dýna verður løgd oman á faktiska veruleikan. Tí hava skeptisku røddirnar mótvegis hesum uppskoti rætt í, at ov nógv regulering kann hótta skrivi-, talu-, og trúarfrælsið. Og sjálvandi skulu vit ansa okkum, at ein slík lógarbroyting ikki elvir til eina totalitera sekularisering, sum talan av og á tykist vera um í okkara grannalondum.

### Konstuktivt klandur

Men hetta er ikki ein haldgóð grundgeving fyri at forkasta uppskotið, tí ætlanin er nevniliga á ongan hátt at útihýsa sjónarmið, sum løgtingslimir í tinginum fríggjadagin vildu vera við.

Tvørturímóti er endamálið heilt einfalt at útbyggja eina paragraff við tí fyri eyga at fyribyrgja diskriminatión, forfylging og happing av minnilutum. Talan er við øðrum orðum um at fyribyrgja ósakliga chikanu og tryggja eitt ávíst støði, tá meiningar bresta saman á vígvøllinum. Tað snýr seg um at seta krøv til tey, sum bera fram síni sjónarmið. Tað snýr seg um at skapa nakrar karmar, sum tryggja eitt konstruktivt kjak. Tað, og einki annað, eigur at vera endamálið við uppskotinum.

Vit skulu sjálvsagt sleppa at klandrast og bresta saman á almenna vígvøllinum, so galið vit vilja, men tað snýr seg um at klandrast á einum konstruktivum støði. Tað snýr seg um at hava nakrar etiskar spælireglur í øllum klandrinum millum ymsu konkurrerandi samfelagsbólkarnar, so tað stríðið, sum samkynd, marxistar, kristin, atheistar, humanistar og fundamentalistar skulu sleppa at føra, samstundis skal vera "fair". Endamálið við uppskotinum eigur við øðrum orðum ikki at vera, at Harra Lognberg skal ganga heima í Skopun við eini meining, sum hann ikki sleppur at bera fram, men at umheimurin skal krevja eitt ávíst støði fyri sakligheit, tá hann úttalar seg.

Opnar konfrontatiónir og ósemjur eru fortreytir fyri einum aktivum fólkaræði, men vit eiga at berjast sum mótstøðufólk og ikki sum fíggindar. Og vit eiga til eina og hvørja tíð at viðurkenna rættin hjá okkara mótstøðufólki til eisini at hava eina meining og stríðast fyri henni. Hetta er sjálvur kjarnin í einum og hvørjum robustum demokratii.

### Kúgingarfrælsið

Frælsið til at bera fram sína hugsan er nevniliga ikki tað sama sum frælsið til at niðurgera øðrvísi hugsandi. Trupulleikin hjá fleiri tingmonnum fríggjdagin var, at teir ikki megnaðu at skilja ímillum hesar báðar formar fyri frælsi.

Og her er ein himmalvíður munur. Vit, sum fylgja við almenna kjakinum, eru dag og dagliga vitni til, at skrivi- og talufrælsið í veruleikanum er vorðið eitt hent amboð hjá mongum føroyingi til at kúga, vanvirða og niðurgera øðrvísi hugsandi menniskju. Undir heitinum "skrivi- og talufrælsi" verða minnilutar og einstaklingar dag og dagliga vanvirdir og drignir gjøgnum díkið, og tað tykist sum fleiri viðmerkjarar í føroysku bløðunum ikki hava skilt, at eisini skrivi- og talufrælsið hevur síni mørk. Vit eru ferð eftir ferð vitni til, at hetta mark verður brotið, tá skrivi- og talufrælsið verður misnýtt og gjørt til eitt effektivt terrorinstrument mótvegis øðrvísi hugsandi. Tá er fruktagóði dialogurin horvin, og í staðin økist óttin, fordómarnir, hatrið, intoleransan og disrespektin. Eitt tragiskt scenarium, sum meirilutin í tinginum eftir øllum at døma vil varðveita.

Kunnu vit sum demokratiskir borgarar vænta, at minnilutar uppliva skrivi- og talufrælsið sum eina dygd, um sama skrivi- og talufrælsið konstant verður nýtt sum vápn at niðurgera onnur? Er demokratiið ikki vorðið ódemokratiskt, tá skrivi- og talufrælsið er vorðið eitt hent amboð at vanvirða lívsvirðir hjá øðrum? Tá vit í fólkaræðisins navni traðka á øðrvísi hugsandi? Tá okkara sokallaða fólkaræði ikki er annað enn okkara heilagi rættur til at diskriminera og leypa á øðrvísi hugsandi?

Rætturin til at demonisera ein heilan fólkabólk verður í dag vardur av landsins fólkavaldu við grundgevingini um, at skrivi-, talu- og trúarfrælsið er í vanda. Ein perverterað útgáva av frælsi, mugu vit bert konstatera. Og avleiðingarnar eru, at polariserandi kjakið, sum vit t.d. vóru vitni til eftir ANSO-ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum, onkuntíð líkist einum asymmetriskum álopi á útvaldar minnilutabólkar. Alternativið er ein fruktagóður dialogur millum ósamdar samfelagsbólkar, men hendan visiónin tykist tíverri ikki at vinna frama í hesum umfari.

Víst standast ávísir trupulleikar av at avmarka skrivi- og talufrælsið við lógum og paragraffum, og í einum ideellum samfelagi hevði hetta heldur ikki verið neyðugt. Men slíkir ventilar eru (tíverri) neyðugir og gagnast øllum. Eisini teimum, sum í dag berjast ímóti hesum broytingaruppskoti, tá tey einferð standa fyri skotum. Hetta er nevniliga ikki ein spurningur um samkyndleika sum so, men um grundleggjandi mekanismurnar handan demokratisku prosessina.

### Fjølbroytt í felag

Vissuliga er eitt vælvirkandi fólkaræði annað enn fleirtalstyranni við nøkrum neyðars ekskluderaðum minnilutum. Sum borgarar í einum pluralistiskum samfelagi mugu vit læra kynstrið at sameksistera við menniskju, sum ikki hugsa og liva sum vit. Og tí mugu vit hava nakrar etiskar spælireglur, nøkur mørk á vígvøllinum, har meiningar møtast og áhugamál kappast. Grundsúlan í modernaða demokratinum má tí vera, at vit eru fræls til at vera fjølbroytt, og at vit eru fjølbroytt í felag.

Ótálmað frælsi gongur altíð út yvir onkran. Eisini tá tað kemur til skrivi- og talufrælsið. Tí kann skrivi- og talufrælsið skjótt koppa yvir í frælsið til at diskriminera onnur. Og uttan nakra regulering hava vit í staðin fingið frítt kúgingarfrælsi í Føroyum. Tí hava vit harðliga brúk fyri at útbyggja antidiskriminatiónsparagraffina í føroysku løggávuni. Og tí fari eg at ynskja Annitu, Finni og teirra stuðlum góða eydnu, nú onnur og triðja viðgerð av uppskotinum standa fyri durum.

# Um happing

**Áhugaverdur spurningur frá Páll á Reynatúgvu**

**Absalon Absalonsen**



Sosialurin hevði nú um dagarnar spurt løgtingslimir, hvør teirra støða var til málið um happing av samkyndum, áðrenn málið kom fyri á tingi , har tað fekk drúgva viðgerð.

Undirritaði legði til merkis, at Páll á Reynatúgvu svaraði, at hann hevði vilja vita, hvat Jesus hevði sagt um viðkomandi mál.

Hetta er sera áhugaverdur og viðkomandi spurningur. Tað er gleðiligt, at ein løgtingslimur hugsar soleiðis.

Neyvan nakar kann siga við vissu, hvat Jesus hevði sagt um málið, men vit kunnu loyva okkum at samanbera, tað hann segði og gjørdi í líknandi førum.

Ein dagin kom ein spitalskur til Jesus. Tað var ikki tespiligur lutur ella lagna at vera spitalskur í Ísrael á Jesusar døgum. Hann skuldi halda seg uttan fyri tilhaldið, og tá fólk nærkaðust honum, skuldi hann sjálvur rópa: "óreinur, óreinur." Hetta mundi kennast manga ferðir verri og svárari enn at vera happaður av øðrum.

Men hesin spitalski, sum vit lesa um í Matteus 8, átti ein dýrgrip, hann átti trúnna á Jesus. Hann fór til hansara, fall niður fyri honum og segði: "Harri, vilt tú, so kanst tú reinsa meg."

Jesus nam við hann og segði: "Eg vil, ver reinur." Í somu stund varð hann reinsaður frá spitalskuni.

Lat hetta vera eina heilsan og ein áheitan til teirra, sum av eini hvørju orsøk kenna seg happað ella forfjónað.

Gerið sum hesin spitalski. Hann boygdi seg fyri Jesusi, trúði á hann og segði: "Harri vilt tú, so kanst tú reinsa meg."

Hetta verður ikki skrivað fyri at seta tey samkyndu í sama bás sum tey spitølsku, men fyri at vísa á at sama hvør trupulleikin er, ið vit menniskju hvør sær hava at dragast við, og um so øll menniskju happa okkum og stoyta okkum frá sær, so er Harrin Jesus til reiðar at hjálpa. Hann er tann sami enn, hann koyrir ongan frá sær.

# Samfelag fyri øll

**Gáttir, smalar hurðar, trappir og ójavnt lendi gera atkomumøguleikarnar truplar fyri fleiri av okkara samfelagsborgarum**

SAMFELAG FYRI ØLL
*tíðindaskriv frá Ráðnum fyri brekað*

Ráðið fyri brekað hevur í hesum døgum tikið stig til eina fundarrøð við kommunufeløgini og avvarðandi landsstýrismenn við tí endamáli at fáa almennar myndugleikar at ganga á odda fyri at tryggja atkomuviðurskifti fyri allar borgarar í Føroyum.

Ráðið fyri brekað arbeiðir við málinum at broyta hugburðin hjá almennu myndugleikunum. Í flestu førum er trupulleikin manglandi tilrættarlegging. Um hugsað verður um atkomuviðurskiftini, tá ein verkætlan byrjar, kostar hetta ikki stórvegis meira. Tað er tí eingin umbering fyri, at fyrilit fyri atkomuviðurskifti ikki verða tikin, tá ið verkætlanir verða framdar.

Ráðið ynskir at vísa á, at tá ið tosað verður um fólk við avmarkaðum førleika, so er ikki talan um ein ávísan avmarkaðan samfelagsbólk. Veruleikin er tann, at vit øll kunnu verða fyri hendingum, ið gera at vit í einum tíðarskeiði ella restina av lívinum hava skerdan førleika. Trupul atkomuviðurskifti skerja eisini møguleikarnar tá eitt nú hjá foreldrum við barnavogni og hjá fólki, ið eru illa gongd.

### Demokratiráðstevna í Keypmannahavn

Norðurlendska handikapp politiska ráðið NHR, hevur skipað fyri eini kanning undir heitinum: "Demokrati for alla". Kanningin snýr seg um atkomuviðurskiftini í parlamentunum í Norðurlondum. Føroyar eru við í hesi kanning, og verða úrslitini løgd fram á ráðstevnu á Christiansborg tann 2. december 2005.

### Íblástur uttanífrá

Fyri at kunna seg um, hvussu arbeitt verður í okkara grannalondum á hesum økinum, fer Ráðið at hava ein innanhýsis temadag miðskeiðis í desembur við Mogens Wiederfelt, sum er aðalskrivari hjá " center for ligebehandling af handicappede" í Danmark. Henda miðstøð er knýtt at danska Ráðnum fyri brekað.

Í Ráðnum fyri brekað sita Sólja í Ólavsstovu, formaður, Jan Simonsen, umboð fyri Almanna- og heilsumálaráðið, Barbara á Tjaldrafløtti, umboð fyri Løgmansskrivstovuna, Marjun S. Olsen, umboð fyri Føroya Kommunufelag, Steinbjørn Jakobsen, umboð fyri Kommunusamskipan Føroya, Uni Rasmussen, umboð fyri MBF og Leila Solmunde formaður í MBF.

Nærri upplýsingar fáast hjá formanninum Sólju í Ólavstovu, á telefon 21 88 86.